

Runavíkar kommuna søkir eftir

# Leiðara til heim fyri minnisveik

Søkt verður eftir leiðara til heim fyri minnisveik til setan skjótast gjørligt.

Endamálið hjá heiminum er at geva minnisveikum fólki, við serligum tørvi á umsorgan, eina trygga og stimbrandi tilveru. Í Eysturoy hava vit ikki royndir við serstøkum heimum fyri minnisveik. Tí verður neyðugt, at bróta upp úr nýggjum og menna eina tilvitaða umsorgan fyri minnisveikum.

Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum dugnaligum leiðara við vitan um og áhuga í støðuni hjá minnisveikum fólki. Umráðandi er, at viðkomandi hevur hug og hegni at leiða, og er fúsur at taka av nýggjum avbjóðingum.

Við tilvísing til sosialu deild hevur leiðarin ábyrgd av:
- at leiða og tilrættisleggja arbeiðið á heiminum
- at reka heimið innanfyri ásetta fíggjarkarmin
- saman við upptøkunevndini at standa fyri visitatión av búfólki til heimið
- at fáa í lag samstarv við stovnar, skipanir og onnur, ið hava týdning fyri virkisøkið hjá heiminum
- at standa fyri fakligari menning av starvsfólkum
- starvsvenjing hjá lesandi og næmingum.

Vit vænta at leiðarin:
- hevur hug og hegni at leiða og fyrisita
- hevur útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur ella líknandi útbúgving
- hevur víðari útbúgving ella serútbúgving innan demensøkið
- hevur leiðsluroyndir/royndir innan primeru heilsutænastuna
- evnar at samstarva bæði við búfólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- hevur royndir í og evni til at menna starvsfólk
- hevur kunnleika til teldu.

Setanar og lønartreytir:
Lønin er sambært sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið ella Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:

Runavíkar Kommuna
Att.: Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðari
Heiðavegur 26, Postboks 139
FO-600 Saltangará

*Umsóknarfreist: Mánadagin 7. juni 2004 kl. 12:00.*

***Heimið á Mýrunum***
*Runavíkar kommuna hevur við stuðli frá Almannamálaráðnum keypt Vistarheimið við Toftavatn og hevur síðani umbygt og umvælt heimið. Í samráð við Almannamálaráðið er avgjørt at heimið skal veita bútilboð til minnisveik fólk úr Runavíkar kommunu og Eysturoy.*

*Á heiminum er pláss fyri 8 minnisveikum fólkum. Umstøðurnar á heiminum eru góðar og væl egnaðar til búfólk ið eru minnisveik. Harumframt liggur heimið í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn.*



Runavíkar Kommuna
Heiðavegur 26 FO-600 Saltangará
Tel. 417000 Fax 417001 • E-mail: runavik@runavik.fo

# Rørir tað teg?

## Evangelisk møtirøð við Robert Bwalya

**29.mai - 04.juni**

Leygardag 29.05……..........kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Hvítusunnudag 30.05...........kl.11.00
*Robert Bwalya talar*

Hvítusunnukvøld 30.05…….kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Hvítusunnukvøld 30.05…….kl.22.00
***Lovsangskvøld***

2.Hvítusunnudag 31.05.......kl.11.00
*Robert Bwalya talar*

2.Hvítusunnukvøld 31.05....kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Týsdag 01.06……………kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Mikudag 02.06…………..kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Hósdag 03.06……………kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Fríggjadag 04.06…………kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

**Øll møtini verða hildin í Filadelfia, Landavegur 22.**

**Les meir á www.filadelfia.fo**

Filadelfia - Landavegur 22 - tel: 314828
email: filadelf@post.olivant.fo - www.filadelfia.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Skúlastýrisval í Tórshavnar kommunu

**Val í skúlastýrini**

Í fólkaskúlalógini er ásett, at eitt skúlastýri skal verða valt til hvønn sjálvstøðugan skúla.

www.torshavn.fo

Val av foreldraumboðum í skúlastýrini í kommunalu skúlarnar í Tórshavnar kommunu verður týsdagin 25. mai 2004.

Atkvøðugreiðslan er í skúlunum frá kl. 14.00 til 20.00.

Argja skúli - Eysturskúlin - Hoyvíkar skúli - Kaldbaks skúli
Kollafjarðar skúli - Kommunuskúlin - Sankta Frans skúli
Velbastaðar skúli - Venjingarskúlin

## Kunngerð um innangarðsútskiftingarfund fyri Norðskála bygd

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 9, verður boðað til útskiftingarfund mikudagin 26. mai 2004 kl. 11.00 í húsinum hjá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum á Oyrabakka.

Til viðgerðar verður innangarðsútskifting av Norðskála bygd.

Nevndarlimirnir eru Marita í Brekkunum, Hósvík og Jákup Skoradal, Miðvágur.

*Tórshavn, tann 6. februar 2004*
**N.v.**
**Øssur A. Midjord**
**útsk. form.**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3782
**Navn:** Sp/f 15.05.2004
**Adressa:** Fugloyarvegur 7, 100 Tórshavn

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 15.05.2004
**Viðtøkudato:** 15.05.2004
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Karlina M. F. Nattestad, Fugloyarvegur 7, 100 Tórshavn.
**Stjórn**: Karlina M. F. Nattestad, Fugloyarvegur 7, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 15.05.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og reka fasta ogn.

*Skráseting Føroya*
*tann 19. mei 2004*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3783
**Navn:** Sp/f Cronicle
**Adressa:** Stoffalág 42, 100 Tórshavn

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 14.04.2004
**Viðtøkudato**: 14.04.2004
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Tróndur Skaalum, Stoffalág 42, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Tróndur Skaalum, Stoffalág 42, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 14.04.2004 - 31.12.2004
**Endamál**: Endamál felagsins er at reka handilsvirksemi, keyp og sølu og annað í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya*
*tann 19. mei 2004*
*Kristin Balle*

i
Sosialurin

Lýsið við brúktum bilum



## Søkt verður eftir starvsfólki til matstovuna

Fólk við royndum hava betri møguleika.

Vinarliga ring
31 34 30 ella 21 34 30

MARCO POLO
Tlf 31 34 30

www.marcopolo.fo

Sosialurin 341800

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Minnisgrunnur Sonnu av Skarði

Stuðul til teirra, ið søkja sær útbúgving í handarbeiði.

Á hundrað ára føðingardegi Sonnu av Skarði tann 19. apríl 1976 stovnaði Tórshavnar kommuna "Minnisgrunn Sonnu av Skarði".

Endamál grunsins er at menna og lívga føroyskt handarbeiði, føroyska handarbeiðsmentan og veita fólki, sum fáa sær handarbeiðsútbúgving í tóvirki (tekstil) fíggjarligan stuðul.

Tygum fáa meiri at vita um minnisgrunnin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara í trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og framtíðarætlanir í tóvirkisútbúgving skal sendast Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, merk "Minnisgrunnur Sonnu av Skarði".

Freistin er sett til 12. juni 2004.

SNARSKIVAN

## Stuðul av játtanini til umhvørvis-verndartiltøk

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál er at stuðla tiltøkum,

- sum menna vitanina um umhvørvið og/ella náttúruna
- sum virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella -avmarkandi
- sum verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg
- sum kunna almenningin um umhvørvis- og/ella nátturuviðurskifti

Játtanin verður umsitin sambært reglugerð sum fæst á www.ilmr.fo, ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

Umsóknarfreistin er 21. juni 2004.



## BILUR VIÐ SKAÐA TIL SØLU!

Fyri P/F Trygd selja vit ein Fiat Brava 1,9 JTD Diesel við skaða. Bilurin er árgang 2000, hevur koyrt uml 36.000 km, og verður seldur sum hann stendur fyri hægsta boð.
Bilurin kann síggjast hjá P/F Reyni Service í Hoyvík og myndir av honum eru at síggja á heimasíðuni hjá Trygd: www.trygd.fo

REYNI SERVICE P/F
Bilasølan - Vegurin Langi - 188 Hoyvík - Tel. 353040

Sosialurin 341800

## Fuglafjarðar skúli

**Skúlastýrisval týsdagin 25. mai**

Val av foreldraumboðum í skúlastýrið fyri Fuglafjarðar skúla verður **týsdagin tann 25. mai 2004 frá kl. 14 til kl. 20 í stovu 209** (uppgongd sunnan fyri svimjihøllina). Møguligar brævatkvøður skulu latast inn í seinasta lagi kl. 18 dagin fyri valdagin!

**Valevnislisti:**
1. Lillian Johannesen, Fuglafjørður
2. Sonja á Líðarenda, Norðragøta
3. Uni Næs, Fuglafjørður
4. Hans Jacob Poulsen, Kambsdalur, Fuglafjørður
5. Palli Vang, Fuglafjørður

**f. Valnevndina**
**Súni í Hjøllum, skúlastjóri**
Tlf. 444087 og Tlf. 214087

Sosialurin 341800

## Stuðul av játtanini til frama fyri viðarvøkstur

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál m.a. er at stuðla viðarvøkstri fyri at fríðka um lendi, skapa lívd og rekreativ øki umframt verja ímóti jarðarmáan.

Játtanin verður umsitin sambært reglugerð sum fæst á www.ilmr.fo, ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

Umsóknarfreistin er 21. juni 2004.

1. uppstillingarfundur til kommunuvalið 2004 verður hóskvøldið 27. mai kl. 19.30.

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøta 9.

Øll javnaðaráhugaði eru vælkomin.

**Nevndin**

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**
www.javnadarflokkurin.fo

# Arbeiðshandskar

***til øll endamál - bæði á sjógvi og landi***

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

Beinleiðis frá framleiðara

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820



# Rolls Royce

Um hóskandi boð fæst,
er hesin Silver Shadow
árg.74 til sølu
**Minsta boð er kr. 120.000,-**

Ring á 218 700

Sosialurin

## Hølir í Tórshavn til leigu

Hølir sum eru vælegnað til skrivstovu, ráðgevingarvirksemi og annað.

Hølini er uml. 100 m² og er møguleiki fyri at víðka til 200 m². Hølini hava egna inngongd og møguleika til allar hentleikar sum t.d. toilet, køk. vm.

Eisini er høli 200 m²/1400 CBM, ið er vælegnað til goymslu, ídnað og annað virksemi. Høli hevur 2 portur sum eru 4,0 x 4,5 metur til støddar hvørt. Toilet og aðrir hentleikar eru í hølinum.

Sera gott útsýni og tætt við høvuðsveg.

**Sosialurin**
**Box 76 · FO-110 Tórshavn**
**Bill.mrk. 609**

veitst tú ikki tað?